


*Nr. 19* *13. september 2020* *80. árg.*

# Signaður bíbliulestur

Helge Skaaheim frá Jesus Nett hevur eina sending á Visjon Norge, sum eitur „Trygg tro". Ein dagin var Hans Johan Sagrusten, teologur, prestur og skald, og sum eisini er tað, norðmenn nevna „bibelbrukskonsulent i Det Norske Bibelselskap", gestur hansara. Sagrusten greiddi frá ymsum, sum hann hevði upplivað, tá ið hann í bíbliuørindum ferðaðist kring um í heiminum:

Tá ið eg ferðaðist um í Kina, upplivdi eg eitt, sum segði mær, hvussu máttmikið Guds orð er, tað er sterkari, enn tú og eg geva okkum far um í dagliga lívinum. Ein kona var ógvuliga sjúk. Tað var onkur blóðsjúka, henni feilti; men eg fekk ikki fatur á akkurát, hvør blóðsjúka tað var. Hon hevði frætt, at longur uppi í dalinum vóru eini kristin hjún, sum bóðu fyri sjúkum. Hóast hon var veik, fór hon til gongu hagar. Hjúnini bóðu fyri henni, og hon varð so líðandi grødd.

Henda konan fór nú saman við manni sínum at lesa hvønn dag í Bíbliuni einar tveir kapitlar. Tey lósu hart og tosaðu um tað, tey høvdu lisið. So vildu grannarnir eisini sleppa upp í bíbliubólkin, og vinfólk og familja løgdust eisini afturat, og skjótt gjørdust tey so nógv, at tey máttu byggja eina kirkju, tí tey rúmaðust ikki í einum privatum heimi. Nú eru 1000 fólk í hesum kirkjuliði. Hetta var eingin prestur ella trúboðari, men eini vanlig hjún, sum vóru upphav til hesa bíbliuvekingina.

Um tú vilt gera bíbliulesturin til okkurt, tú rættiliga fært gagn úr, so skal tú lesa soleiðis:

1) Hvønn dag

2) Tú skalt halda á við lestrinum, har tú slepti í gjár, altso

tú skalt lesa samanhangandi 3) Tú skalt lesa hart saman við onkrum. Hetta hjálpir tær at halda teg vakna. Sløkk fartelduna og fartelefonina. Bíbliulesturin hevur størri týdning, hann gevur tær saft og kraft at ganga á Himmalvegnum, og nú nærkast tíðin, tá ið Jesus kemur eftir teimum trúgvandi.

Eg var og ferðaðist á Kuba. Har hava teir sett ein bisp, sum burturav skal taka sær av bíbliulestri. Bispurin kom við hesum ráðum: Tá ið tú ert liðugur at lesa í dag, skalt tú ikki lata Bíbliuna aftur, nei, hon skal liggja opin á stovuborðinum. So kanst tú í morgin halda áfram við lestrinum, har tú slepti. Tá ið tú kemur fram við hesi opnu Bíbliu gjøgnum dagin, fært tú kanska hug at lesa nøkur vers. Tú vitnar eisini fyri teimum, sum støkka inn á gólvið hjá tær, tí tey síggja, at hetta er eitt heim, har Bíblian er ein opin bók, og hetta húskið hevur Jesus í miðdeplinum.

Hvar skal ein so byrja bíbliulesturin, á síðu eitt sum í øðrum bókum? Nei, byrja við Markusar Evangeliinum, tað er tað stytsta, og har fært tú eina klára mynd av Jesusi. So kanst tú halda á við Jóhannesi, Lukasi, Ápostlasøguni, Efesarabrævinum, og inn ímillum kanst tú lesa úr Sálmunum, endaði Hans Johan Sagrusten samrøðuna.

*Effie Campbell.*

# Hin antisemitiski andin

Holocaust var enn ein satanisk roynd at beina fyri tí fólkinum, haðani FRELSAN er KOMIN – og haðani FRELSARIN VENDIR AFTUR TIL. Upp úr holocaust øskuni varð Ísrael borið í heim 14. mai 1948. Sálmur 83 greiðir frá søgu Ísraels síðani tá og til dagin í dag. Har stendur í V.D. ums.:

„Tí TÚ sært, at fíggindar Tínir gera óljóð; teir, ið hata TEG, lyfta høvdinum. Móti fólki TÍNUM leggja teir loynilig svikaráð; teir ganga saman í ráð móti teimum, ið TÚ verjir; teir siga: „Komið, latið okkum beina fyri teimum, so tey eru ikki eitt fólk longur! Eingin skal aftur minnast navn Ísraels!“

Tað er levitturin Asaf, sum fyri uml. 2.500 árum síðani hevur skrivað Sálm 83. Orð hansara eru háprofetisk. Um hann kann fylgja við úr Himli, so hoyrir hann hesi orð: „LATIÐ OKKUM BEINA FYRI ØLLUM FÓLKINUM, SO EINGIN SKAL AFTUR MINNAST NAVN ÍSRAELS!“ rópa fíggindarnir.

Vit eru skelkað at síggja tær myndirnar, sum nasistarnir sjálvir tóku. Men fá lata við seg koma, nú Iran opið boðar frá, at teir fara at gera tað arbeiðið liðugt, sum Hitler ikki megnaði.

At týna og oyða Ísrael fer at verða ætlan Satans til tann dagin, hann verður blakaður í eldsjógvin. Men Gud hevur eina ætlan, og Hann vil verja Ísrael, og soleiðis er tað.

*Effie Campbell* umsetti.

# Náttarbøn

Eitt leygarkvøld sótu vit og hugdu at norsku rásini Kanal 10. Har høvdu teir eina sending, sum kallast „Bønn i natten". Eini 4-5 fólk vóru savnað og skuldu so biðja inn í ávís evni. Tá ið tey bóðu, skuldu tey leggja dent á at biðja fyri teimum kristnu samkomunum um hesi ávísu evni.

Tann fyrsti, sum bað, segði, at t.d. seksuella syndin rakk langt inn í kristnu meinigheitirnar, og øll trúgvandi vóru helst ikki greið um, at tað er ein demonur – tann sekuselli demonurin – sum stendur aftanfyri. Hann fór so at siga frá einari hending, sum hann hevði verið úti fyri.

„Stutt eftir, at eg varð umvendur, fór eg í marinuna. Eg sigldi við einum minusveipara. Hetta vóru gomul træskip, sum vórðu brúkt undir seinna heimskríggi, og sum vórðu keypt úr Onglandi. Eina náttina hevði eg vakt. Eg sat í stýrhúsinum, púra einsamallur, og hugdi frameftir. Tá sá eg eina sjón, og tað er sterkasta sjónin, sum eg nakrantíð havi havt. Sjálvt um eg hugdi frameftir, sá eg eitt skepilsi standa aftan fyri meg. Tað líktist nógv einum eingli. Ljósið skein frá tí, men eg merkti skilliga, at hetta var okkurt ónt, og tað sá so sleiskt og lumpisligt út. Skriftin sigur, at sjálvur satan umskapar seg til ein ljósins eingil.

Eg fór at biðja: „Vík frá mær í Jesu navni!!" Hetta nærkaðist kortini, men eg herjaði á í bønini og bleiv við at biðja somu bøn aftur og aftur. So at enda hvarv tað. Ein av hinum ungu dreingjunum fór í land, tá ið vit komu í havn. Í kamarinum hjá honum niðriundir var allur veggurin tapetseraður við pornumyndum. Vit skræddu tær allar av vegginum og blakaðu tær burtur. Tá hvarv alt tað onda, og friður bleiv umborð. So vandamikið er tað at spæla við seks, tað er demoniskt."

*Effie Campbell.*

# Ger „tíggjunda-kanningina“

*„Berið alla tíggjundina inn í goymsluna ...“ Mal. 3,10 V.D.*

Bíblian endurgevur hesa áhugaverdu samrøðuna millum Gud og fólk hansara: „…Vendið við til Mín, so skal Eg venda við til tykkara! – sigur Harrin Gud herskaranna. – Tit siga: „Hvørjum skulu vit venda við frá!“ Skal tá menniskja ræna frá Gudi, síðani tit ræna frá Mær! – Tit siga: „Hvat hava vit rænt frá Tær!“ Tíggjundina og hinar heiløgu gávur! Bannið er komið yvir tykkum, og tit ræna frá Mær, ja, alt fólkið! Berið alla tíggjundina inn í goymsluna, so matur kann vera í húsi Mínum – roynið Meg á henda hátt – sigur Harrin Gud herskaranna – um Eg ikki tá lati upp lúkur himmalsins fyri tykkum og lati signingar í yvirflóð streyma niður yvir tykkum! Eg skal styggja burt etaran fyri tykkum, so hann ikki forkemur tykkum grøði landsins, og víntræ tykkara á markini skal ikki standa við ongum ávøksti – sigur Harrin Gud herskaranna. Øll fólkasløg skulu prísa tykkum lukkulig; tí land tykkara skal tá vera yndisligt land – sigur Harrin Gud herskaranna.“ (vers 7-12 V.D.)

Sum svar til spurningin hjá ísraelsmonnum: „Hvussu kunnu vit prógva, at vit av sonnum eru vend aftur til tín, Harri?“ svaraði Harrin: „Við tíggjundina!“

Her eru trý ting, Bíblian sigur, fer at henda, tá ið tú gevur Gudi 10% av inntøku tíni:

**1.** Himmalsins lúkur verða latnar upp, og Hansara signingar fara at streyma í yvirflóð inn í títt lív.

**2.** Eitt guddómligt verndarhegn verður sett kring teg, tíni kæru og alt, sum er títt.

**3.** Fólk, sum eru uttan um teg, síggja tað og hava á orði Guds signingar í lívi tínum.

So um tú ikki hevur givið tíggjunda, av tí at „tíðirnar eru ringar“, og tú kvíðir fyri, at tú fært ikki endarnar at møtast, so bjóðar Gud tær av í dag og sigur: „Roynið Meg!“

*„… et Ord til Dagen“ - Effie Campbell* umsetti.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 13. sept. | Tekstur: Jóh. 4,5-30 | bíbliuorð: Jóh. 4,14a |
| 20. sept. | Tekstur: 1 Mós. 12,1-5; 18,1-15 | bíbliuorð: Sl. 143,8b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen, á Gøtuteigi 8, 520 Leirvík.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




*Nr. 20* *27. september 2020* *80. árg.*

# Bíbliunnar moralur er ikki avoldaður

*Anne Gustavsen*

Bíbliunnar moralur er ikki avoldaður. Kristin hava verið uppií at evna hetta landið. Vit mugu kunngera tann sannleikan, at Jesus setir okkum í frælsi frá syndini. Vit mugu vísa menniskjum rætta kós og hava umsorgan fyri teimum.

Okkara uppgáva er at prædika evangeliið og samstundis vera ein profetisk rødd í tíðini. Tað skal gerast týðiligt og við frímóði. Vit hava uppskriftina upp á besta samfelagið at vaksa upp í. Eitt tannleyst evangeliið broytir einki. Jesus hataði syndina, men elskaði syndaran. Vit mugu hava sannan kærleika til syndaran eins og Jesus og vera trúgv móti orði hansara.

Svarið er ikki at linka krøvini og gera eina neyðsemju. Vit skulu ikki broyta evangeliið eftir dagsins ráki. Fólk flyta mørkini alla tíðina. Vit skulu seta Guds orð fremst. Vit umsita ikki loyvini at synda, men skulu boða syndanna fyrigeving. Tað, sum er grundleggjandi, kann ikki vikast. Um vit ikki eru týðilig, hvør skal so vera týðiligur? Vit kunnu ikki gera eina neyðsemju við Guds orð í einum ynski at náa út til onnur við evangeliinum.

Vit mugu lurta eftir tí, sum Bíblian sigur, meir enn hvat ið onnur royna at siga okkum. Vit mugu hava ærufrykt fyri Gudi og orði hansara, sum stendur fast til ævigar tíðir.

*Effie Campbell* umsetti.

# Vit síggja tað, sum eingin hevur sæð undan okkum

Hyggur tú at einum málningi í 100 metra frástøðu, sært tú ongar smálutir. Tú sært fleiri smálutir, um tú bara ert 50 metrar burturi. Men ikki fyrr enn tú stendur bara ein metur frá málninginum, kanst tú rættiliga síggja smálutirnar.

Í mong hundrað ár hava forfedrar okkara staðið yvir 100 metrar frá tí „Profetisku Myndini av Endatíðini“, sum Orðið skilliga greiðir frá. Tey hava **lisið** tað, t.d. um endurreisn Ísraels og Jerusalem sum klandursevni hjá øllum heiminum. Tey hava **trúð** tí. Tey hava livað í **vónini**. Tey hava **biðið**. **Men tey hava ikki sæð tað!**

Eg vági mær at siga, at **vit** eru ættarliðið, sum stendur nakrar fáar metrar frá **Guds profetisku mynd av endatíðini** – har, vit **síggja** fleiri og fleiri smálutir. So nógvar smálutir, at tað ikki er burturvið at tala um Jesu afturkomu.

Í Matt. 24, Markus 13 og Lukas 21 greiðir Jesus í ógvisligum myndum frá tíðini undan afturkomu síni. Og ferð eftir ferð sigur hann: „Tá ið tit síggja … so vita tit, at tíðin er nær!“

Brúka tí tíðina væl – bið, arbeið og gev – og ver til reiðar til Jesu afturkomu – í einum nú, í einum eygnabragdi. (1. Kor. 15,52).

*Effie Campbell* umsetti.

# Sera sterkur vitnisburður úr Mali

Troens Bevis sendi Hans Martin Skagestad til Mali í Afrika at halda eina møtirøð í býnum Dioila. Har var hann nógv saman við einum ungum manni, sum hjálpti til við møtirøðini. Maðurin eitur Yoro Diallo, og hann er evangelistur, sum verður løntur frá Troens Bevis. Hansara søga er sterk. Hann greiðir frá, hvussu hann mátti rýma frá sínari muslimsku familju:

Pápi mín er imamur. Eg hoyrdi fyrstu ferð um Jesus, tá ið ein evangelistur úr Nigeria vitnaði fyri mær. Tá segði eg, at tað var ógjørligt hjá mær at gerast kristin. Somu nátt droymdi eg ein dreym. Eg sá eitt sterkt ljós inni í kamari mínum, og eg hoyrdi eina rødd, sum segði: „Yoro! Alt tað, sum tú eigur, tað hevur tú bara í hesum lívi. Hvat heldur tú hendir, tá ið hetta lívið endar?“

Hetta fekk meg at hugsa um tað, sum evangelisturin segði, og eg gjørdi av, at eg vildi gerast kristin. Eg vágaði ikki tá at siga pápa frá hesum, men eftir eina tíð mátti eg siga honum tað. Hann gjørdist so fúkandi óður og keddur. Hann segði mær, at av tí at hann var imamur, so mátti eg ofrast. Hann bjóðaði øllum at koma til ofringina, og dagur og tíð vórðu kunngjørd. Kvøldið fyri ofringina, bað hann meg rýma. Eg rýmdi inn til høvuðsstaðin.

Yoro greiðir víðari frá, at hann valdi at ogna Gudi lív sítt 100%, eftir at hann hevði upplivað at lært enskt í einum dreymi frá Gudi.

Missiónsboðini eru enn í gildi. Jesus segði: „Farið út um allan heimin og kunngerið gleðiboðskapin." ... Og teir fóru út og prædikaðu allar staðir, og Harrin arbeiddi við og staðfesti orðið við teimum teknunum, sum við fylgdu." Mark. 16,15 og 20.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein vegleiðari – ein góður hirði

Í okkara dagligu andakt syngja vit einar tveir sálmar, lesa ein kapittul í Bíbliuni og samtala um hann. So biðja vit saman. Í gjár lósu vit 13. kapittul í Hebrearabrævinum. Í vers 17 stendur: „Verið **vegleiðarum** tykkara lýdnir, og verið flýggjaligir móti teimum! **Tí at teir vaka yvir sálum tykkara sum teir, ið eiga at gera roknskap**, fyri at teir mega gera tað við gleði og ikki suffandi; tí at tað er tykkum at gagni."

So fóru vit at samtala um hetta at vera ein vegleiðari, og tóku vit fram tvey dømi. Fyrra dømi hevði eg hoyrt í Lindini fyri nógvum árum síðani. Ein maður vitnaði, at tá hann var ungur, fór hann at ganga í einari samkomu. Men so fór hann at slaka við møtigongdini, og at enda gavst hann at fara á møti. Tá kom fyristøðumaðurin, sum var norðmaður, heim til hansara at tosa við hann, og úrslitið av tí var, at hann aftur fór at ganga trúliga á møti, og at hann síðani hevði tænt Harranum heilt at ellisárum. „Hann var ein góður hirði, sum leitaði upp seyðin og beindi hann á rætta leið," endaði maðurin sín vitnisburð.

Seinna dømi høvdu vit bæði upplivað á einum húsmøti, har ein maður vitnaði og segði, at hann var formaður í missiónshúsinum í heimbygdini, og at tað var ein stór ábyrgd, tí teir skulu vaka yvir sálunum, sum teir hava fingið litið til, og so sipaði hann til hetta bíbliuorðið í Hebr. 13,17.

Síðani greiddi hann frá: „Tá ið karismatiska vekingin var í 70-árunum, vóru vit so brennandi. Eg og ein vinmaður settu okkum fyri at fara til eina lítla bygd. Eg eri eingin talari, men ein vitnisburð kann eg altíð hava. Tað ræður um at brúka tað, sum Gud hevur lagt niður í teg. Brúka gávurnar, so vaksa tær! Vit fóru so. Har vóru fá fólk á møti, men vit sungu, vitnaðu og hildu eina lítla talu.

Tað gingu tvey ár. So kom ein kona til mín og spurdi: „Kennir tú meg aftur?“ Jú, eg mintist væl til hennara. Hon var ein, sum hevði verið á møti í teirri lítlu bygdini. Hon greiddi so frá, at tá ið hon kom til hús eftir møtið, kom maðurin ímóti henni, og hann var øgiliga óður, av tí at hon hevði verið á møti. Hann reiggjaði ein knýttan neva upp um høvdið og ætlaði at geva henni ein frammaná. Men armurin steðgaði uppi við oyrað á honum og stóð og peiggjaði beint uppeftir, so datt hann stillisliga niður við liðina. Hví? Tí at hann sá eina sjón. Ein maður stóð aftan fyri konu hansara. Tá tordi hann ikki at arbeiða ímóti Gudi longur. Men konan sjálv sá ongan mann. Ja, so veldiliga kann Gud grípa inn.

Tað var ein maður, sum ferðaðist kring Føroyaland og talaði. Hann gekk í einum gráum, síðum yvirfrakka. Tá ið hann var vorðin aggandi gamal, fór hann upp á talarastólin í missiónshúsinum í heimbygdini. Hann var so skroypiligur, at teir máttu styðja hann upp. Tá kom hann við einum profetiið: „Tá ið svart kemur upp úr jørðini, tá fer syndin at blóma sum ongantíð áður!“

Hetta var langt áðrenn, at teir høvdu funnið olju í Noregi. Men profetaorðini eru sonn. Nógvur ólevnaður fylgir í kjalarvørrinum av oljuídnaðinum, so latið okkum vera á varðhaldi,” endaði maðurin vitnisburð sín.

*Effie Campbell.*

---

Ísrael er eitt slag av einari myndabók upp á tann sannleikan, at tað, sum er ógjørligt hjá menniskjum, er gjørligt hjá Gudi.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 27. sept. | Tekstur: 1 Mós. 21,1-5; 22,1-19 | bíbliuorð: Ják. 2,23 |
| 4. okt. | Tekstur: 1 Mós. 24,1-67 | bíbliuorð: Matt. 7,7 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen, á Gøtuteigi 8, 520 Leirvík.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74